# TB og Fram skulu svara aftur

**Eftir at bæði kvinnurnar hjá TB og menninir hjá Fram síðsta vikuskifti taptu fyri fyrstu ferð, hevur tað týdning fyri bæði liðini at svara aftur við sigrum í dag. Á pappírinum síggja møguleikarnir hjá Fram eitt sindur betri út enn teir hjá TB**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Sjeynda umfar av flogbóltskappingini hjá kvinnum og monnum verður spælt í dag, og serliga spennandi verður at síggja, hvussu fer at gangast í kvinnudystinum millum ÍF og TB. Hin dysturin hjá kvinnum er millum Mjølnir og Fleyr, og her er Mjølnir favorittur at vinna.

Hjá monnunum tekur oddaliðið Fram ímóti botnliðnum ÍF, og í Klaksvík hittast Mjølnir og Fleyr.

### Toppdystur á Kambsdali

Síðsta vikuskifti steðgaði Mjølnir sigursrøðini hjá TB, og tað hevur skapt enn størri spenning um dystin hetta vikuskiftið millum ÍF og TB. Liðið av Tvøroyri fekk eina flúgvandi byrjan uppá kappingina, men tapti altso seinast, og um tað eisini eydnast ÍF at vinna móti TB í dag, kemur veruligur spenningur í kappingina aftur.

ÍF er í løtuni næstfremst og kann við einum sigri minka munin niður í tvey stig.

Í hinum kvinnudystinum er Mjølnir favorittur at vinna móti Fleyr. Mjølnirkvinnurnar fingu ikki nakra góða byrjan uppá kappingina, men nú hava tær vunnið tveir teir seinastu dystirnar, millum annað móti TB í Trongisvági. Hjá Fleyr hevur tað gingið eitt sindur striltið, og enn er 3-2 sigurin móti Drátti teirra einasti í kappingini.

*ÍF gav Fram ein sera harðan dyst, tá liðini hittust á Kambsdali*



### Bæði hava brúk fyri stigunum

Eins og TB hjá kvinnum, so taptu menninir hjá Fram fyri fyrstu ferð síðsta vikuskifti. Tað var móti SÍ í Sørvági, men heimadysturin í dag móti ÍF sær út til at vera ein meira yvirkomilig uppgáva. Besta aftursvarið til ein taptan dyst er at vinna næsta dystin, og tað er eingin ivi um, at tað er júst tað sum Fram ætlar sær at gera. So tað verður ivaleyst trupult hjá fuglfirðingum, sum enn einki stig hava fingið.

Dysturin millum Mjølnir og Fleyr í Klaksvík sær eitt sindur javnari út. Hvørki av liðunum hevur enn veruliga fingið ferð á, og bæði hava í ár staðið í skugganum av Fram og SÍ. Men serliga hjá Mjølni hevur framgongd verið at hóma, og á heimavølli verða teir tungir at syfta hjá Fleyr, sum annars hevur brúk fyri stigunum.

## Dystir hetta vikuskiftið

### Hondbóltur, 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01.12 | 15.30 | Sóljan-Stjørnan | Ingi/Áki |
| 02.12 | 13.30 | VB-StÍF | TB |
| 02.12 | 14.30 | VÍF-Kyndil | Kári/Trúgvi |

### Hondbóltur, 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01.12 | 16.00 | KÍF-StÍF | Hannis/Uni |
| 02.12 | 16.00 | H71-Tjaldur | Hjalmar/Kristian |
| 02.12 | 16.00 | VÍF-Kyndil | Kári/Trúgvi |

### Flogbóltur, meistaradeild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01.12 | 13.00 | Mjølnir-Fleyr | Dráttur |
| 01.12 | 13.00 | ÍF-TB | Dráttur |

### Flogbóltur, meistaradeild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01.12 | 14.00 | Fram-ÍF | SÍ |
| 01.12 | 15.00 | Mjølnir-Fleyr | SÍ |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 6 | 5 - 1 | 16 | 5 | 11 | 10 |
| 2 | ÍF | 5 | 3 - 2 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| 3 | Dráttur | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 4 | Mjølnir | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 5 | Fleyr | 5 | 1 - 4 | 5 | 14 | -9 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 6 | 5 - 1 | 16 | 6 | 10 | 10 |
| 2 | Fram | 6 | 5 - 1 | 16 | 10 | 6 | 10 |
| 3 | Fleyr | 5 | 2 - 3 | 9 | 10 | -1 | 4 |
| 4 | Mjølnir | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 5 | ÍF | 6 | 0 - 6 | 5 | 18 | -13 | 0 |

# Simultankappingin

**Stóra EBL-simultankapping í bridge er júst liug. 31 føroysk pør luttóku í kappingini**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Tann evropiska simultankappingin varð spæld 26. og 28. november. Tilsamans 31 pør spældu við í Føroyum. Í Havn 12 pør, í Fuglafirði 9 pør og í Klaksvík 10 pør.

### Úrslit

26. nov. í Tórshavn
(pørini yvir miðal — miðal er 165)

| | |
|---|---|
| 1. Hans Jacob Petersen — Arnbjørn Sivertsen | 182 |
| 2. Jóannes Mouritsen — Heðin Mouritsen | 179 |
| 3. Ásla Weihe — Hallgerð Hansen | 178 |
| 4. Ásvør Djurhuus — Ingibjørg Hansen | 175 |
| 5. Høgni Jacobsen — Finn Ougaard | 172 |
| 6. Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen | 167 |
| 7. Hanus Bærentsen — Eyðbjartur Danielsen | 166 |

26. nov. í Fuglafirði
(pørini yvir miðal — miðal er 108)

| | |
|---|---|
| 1. John Reid Skoralíð — Sigmund Dam | 127 |
| 2. Robert Langgaard — Eyðun Anthoniussen | 117 |
| 3. Haldor Ellingsgaard — Ingolf Olsen | 117 |
| 4. Dia Jacobsen — Ólavur Ellingsgaard | 116 |
| 5. Símin Lassaberg — Marner Joensen | 115 |
| 6. Dia Petersen — Páll Hansen | 114 |

28. nov. í Klaksvík
(pørini yvir miðal — miðal er 108)

| | |
|---|---|
| 1. Randi Jacobsen — Álvur Klakk | 129 |
| 2. Carl Isaksen — Jens Jacobsen | 124 |
| 3. Poul Sigmund Sørensen — Debes Christiansen | 121 |
| 4. Hjørleif Frederiksen — Jógvan Clementsen | 119 |
| 5. Sámal Just Dahl — Steinbjørn Jacobsen | 112 |
| 6. Marita Krosstein — Jórun Højsted | 111 |

### Spæl 29

N/allir

Norður
Sp 10985
Hj Q84
Rú AJ108
Kl K4

Vestur
Sp AJ42
Hj A9762
Rú 9
Kl 1086

Eystur
Sp Q73
Hj KJ53
Rú 76
Kl AJ53

Suður
Sp K6
Hj 10
Rú KQ5432
Kl Q972

Leikararnir fingu eftir kappingina bókling við spølunum og viðmerkingum. Um spæl 29 skrivar Mark Horton nakað soleiðis:

»Enn eitt trupult spæl. Burtursæð frá teimum djørvu, sum opna við hondini hjá Eysturi, verður tað Suður, sum skal taka ta fyrstu avgerðina, antin at melda pass ella okkurt í rútara. Eitt pass frá Suðuri kann geva pass runt, og leikararnir fara undir næsta spæl. Men har ið Suður velur at opna, fær Vestur, sum hevur báðar majorlitirnar, hug at blanda seg uppí.

Kortini sita væl fyri Eystur og Vestur, og teir kunnu fáa heili 11 stikk í einari hjartarakontrakt. Tey EV pørini, sum melda útgang, fáa eitt gott úrslit.«

Við borðið, har Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen sótu EV og Ásla Weihe og Hallgerð Hansen NS, gekk meldið soleiðis:

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | pass | pass | 1rú |
| 2kl* | 2rú | 4hj | pass |
| pass | D | pass | pass |
| pass | | | |

2kl vísir báðar majorlitirnar við longri hjartara, eitt slag av heimagjørdum Michaels Cuebid.

Hallgerð spældi rúK út og síðan kleyvara til kong og ess. Trumfur bleiv klíptur gjøgnum Norðan, og um Hans Jacob síðan hevði spælt spaðara til dreingin og tikið spA, hevði hann fingið ikki færri enn 11 stikk. Men hann var nøgdur við 10 stikk. Tá kontraktin var duplað, gav hetta EV 790 og ein góðan topp.

Eitt annað EV par í Bridgehúsinum, Jógvan Ranghamar og Carl Mikkelsen, meldaði og vann eisini 4hj, men teir vóru ikki dupladir.

Tey, sum hava hug at síggja hvussu pørini hava staðið seg í Evropa, kunnu fara inn á heimasíðuna: www.eblsims.org

### Jólakapping

Jólakappingin hjá FBS, sum skuldi vera 8. desember, er avlýst. Í staðin hevur Bridgedeild Kaggans einstaklingakapping í Bridgehúsinum 8. desember kl 14.00. Hetta er ein opin kapping, men fólk skulu melda seg til kappingina í seinasta lagi dagin fyri hjá Róa á Rógvu Joensen, tel 31 94 19.



# VÍF kann gera bart

*VÍF kann leggja seg á odda um vikuskiftið, og teir mugu roknast sum stórfavorittar til heimadystin móti Kyndli*



**Vinna vestmenningar heimadystin á Kyndli, fara teir framvið Neistanum á stigatalvuni**

HONDBÓLTUR - MENN
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir í bestu mansdeildini eru á skránni um vikuskiftið.

Fyrstur av hesum er dysturin í Vestmanna leygardagin, har KÍF tekur ímóti StÍF. Fyri bæði liðini hevur higartil verið galdandi, at stabilitetur als ikki er nakað, sum hevur eyðkent avrikini, og frá at spæla mest sum upp til bestu liðini í deildini, hava liðini síðani ligið fyri lægri staddum liðum.

Hesa ferð hava tey so bæði ein møguleika at rætta upp á hesa gongdina, og ikki minst hevur hetta týdning fyri strandingar, sum helst skulu hava tvey stig, um teir skulu fylgja við hoyvíkingunum á triðja plássinum.

### Oddasessurin í eygsjón

Tá tosað verður um oddalið, so verður VÍF alla tíðina nevnt, men sum støðan er á stigatalvuni, so eru teir í løtuni bert nummar tvey.

Neistin hevur tó leikt ein dyst fleiri enn vestmenningarnir, og tá havnarmenninir hava frí hetta vikuskiftið, hevur VÍF nú møguleikan at seta seg sjálvt á ovastu rók.

Hóast teir eru favorittar móti Kyndli, so fara vestmenningar tó neyvan at undirmeta mótstøðuna. Talan er framvegis um stóra klassikaran í føroyskum manshondbólti, og tí fara kyndilsmenn uttan iva at geva alt – og helst nakað afturat – fyri at fáa eitt gott úrslit við sær heimaftur. At teir so eisini fingu gongd á aftur stigasavnanina í dystinum móti H71 mikukvøldið, ger neyvan uppgávuna hjá VÍF lættari.

Samstundis, sum Kyndil vitjar í Vestmanna, verður dystur í Høllini á Hálsi í Havn, har H71 fær vitjan av Tjaldri.

Her er talan um tvey lið, sum bæði hava havt viðrák seinstu vikurnar, men fyri bæði var mikukvøldið eitt slag av Nemesis, har tey komu niður aftur á jørðina.

Tí ræður nú um at reisa seg, og hetta kann best gerast við einum sigri. Tó at hoyvíkingar eru væl betri fyri á stigatalvuni, so eigur favorittleiklutur teirra tó ikki at gerast ov stórur her, tí sæð burtur frá mikukvøldinum, so hava runavíkingarnir veruliga víst tenn seinastu tíðina, og teir vilja seta seg sjálvar til sættis við verandi fimta plássinum.

# Tríggir stórfavorittar

**Eftir øllum at døma fer fjarstøðan frá botnliðunum at økjast tvey stig afturat sunnudagin**

HONDBÓLTUR - KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Í Vestmanna verður uttan iva roknað við, at kvinnuliðið fer at vinna trygt, tá Kyndil kemur á vitjan*

Tríggir dystir verða í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið, og felags fyri hesar er, at talan í øllum førum er um dystir, har eitt av botnliðunum er annar parturin.

### Upphiting til brakið

Á Giljanesi tekur Sóljan ímóti Stjørnuni, og alt bendir á ein tryggan útisigur í hesum dystinum. Sóljan hevur havt nakað av framgongd seinastu tíðina, men neyvan er hetta nóg mikið til at skala klaksvíkingum, sum helst fara at nýta dystin sum eitt slag av upphiting til stórdystin um eina viku, tá VÍF kemur á vitjan.

Tað er heldur ikki óhugsandi, at VÍF á sama hátt fer at nýta sín heimadyst móti Kyndli til eitt slag av upphiting, har summir lutir kanska kunnu fínpussast. Hjá Kyndli hevur alt gingið av skriðuni hetta kappingarárið, og at tær skulu gera nakað sum helst við VÍF má metast sum ørvitistos av eini aðrari verð.

Seinasti dysturin er tann í Vági, har VB fær vitjan av StÍF. Hóast talan er um nummar fýra og fimm á stigatalvuni, so er VB stórfavorittur at vinna dystin. Hetta sigur kanska eisini nakað um tann munin, sum er ímillum tey trý botnliðini í deildini og so hini, og eftir øllum at døma verður hesin munur toygdur tvey stig afturat um vikuskiftið.

**Støðan 1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 8 - 0 - 0 | 240 | 139 | 101 | 16 |
| 2 Stjørnan | 8 | 7 - 0 - 1 | 226 | 172 | 54 | 14 |
| 3 Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 197 | 175 | 22 | 12 |
| 4 VB | 8 | 4 - 0 - 4 | 198 | 198 | 0 | 8 |
| 5 Sóljan | 8 | 2 - 0 - 6 | 170 | 227 | -57 | 4 |
| 6 Kyndil | 9 | 1 - 0 - 8 | 199 | 246 | -47 | 2 |
| 7 StÍF | 8 | 1 - 0 - 7 | 133 | 206 | -73 | 2 |

**Støðan 1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Neistin | 9 | 7 - 2 - 0 | 274 | 232 | 42 | 16 |
| 2VÍF | 8 | 7 - 1 - 0 | 232 | 187 | 45 | 15 |
| 3H71 | 9 | 5 - 0 - 4 | 241 | 242 | -1 | 10 |
| 4StÍF | 9 | 3 - 1 - 5 | 241 | 240 | 1 | 7 |
| 5Tjaldur | 8 | 2 - 1 - 5 | 189 | 217 | -28 | 5 |
| 6Kyndil | 9 | 2 - 0 - 7 | 210 | 237 | -27 | 4 |
| 7KÍF | 8 | 1 - 1 - 6 | 197 | 229 | -32 | 3 |

## Máltindarnir

Kvinnur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 89 | (26) |
| Gabriella Fekete | VB | 81 | (21) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 73 | (9) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 63 | (23) |
| Ioana Rápa | VÍF | 52 | (14) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 47 | (21) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 39 | |
| Birita Wardum | Neistin | 39 | (3) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 39 | (4) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 38 | (2) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 38 | (9) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 37 | |
| Nicoleta Radu | VÍF | 35 | |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 35 | (4) |
| Regina Radó | VB | 35 | (6) |

menn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 62 | (18) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 58 | (6) |
| Finnur Hansson | H71 | 58 | (16) |
| Høgni Klein | Kyndil | 54 | (2) |
| Heini Joensen | Neistin | 53 | (17) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 52 | (9) |
| Bjarni Wardum | H71 | 51 | (12) |
| Sámal Joensen | VÍF | 50 | (8) |
| Ingi Olsen | VÍF | 47 | (6) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 44 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 42 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 40 | (4) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 40 | (15) |
| Kári Mortensen | Neistin | 39 | |
| Dorica Tomic | KÍF | 37 | (7) |

Opel Tigra

